# UNDADALI



**SMS 3. HÁLVLEIK:**
*»21-spæl verður í HB-húsinum í kvøld«*

*»Hjartaliga tillukku við heitinum, sum tit fingu forerandi frá tí betra liðnum í dag«*



## TRÚÐI UPP Á TAÐ

Tá HB eftir eitt fríspark fimm minuttir fyri hálvleik legði seg á odda 2-0, hóast B36 í einar 20 minuttir hevði havt bóltin mest og roynt at trýst, gav tað málskjúttanum gott mót til restina av dystinum.
– Eg fekk fatur í bóltinum, tá hann kom út frá aftur, og fekk sett hann í netið. Og tá vit tá komu upp á 2-0, trúði eg av álvara uppá, at vit fóru at vinna dystin. Eisini, hóast teir beinanvegin skoraðu til 2-1, segði Hendrik Rubeksen, ið var komin fram av vinstra bakki, tá Vagnur Mohr Mortensen skuldi skjóta fríspark. At tað loysti seg at fara fram, staðfesti Hendrik, tá hann leitað framaftur gamla framherjatevið og trygt sendi bóltin í málið. Hóast útgangsstøði aftarlaga á vøllinum, var tað eisini hann, sum nakað inn í seinna hálvleik hevði tað einasta, ið minti um ein veruligan HB-kjans í restini av dystinum.

*-hil*

## SÁLARLIGA KLÁRIR

– Kenslan er øgiliga góð, líka góð sum í fjør. Tað stóð avgjørt eitt sindur á í seinna hálvleiki, men trýstið var ikki so stórt. Vit løgdu okkum automatiskt aftur at verja støðuna, og eg haldi, at vit vóru sálarliga klárir til tað, segði 20 ára gamli argjamaðurin hjá HB, Rógvi Poulsen, sum er ein av trimum spælarum á meistaraliðnum, ið hevur spælt við í øllum dystunum í ár, og við átta málum er hann næstbesti málskjúttin hjá HB í landskappingini.

*-hil*




*Hendrik Rubeksen (12), hevur júst sent returbólt í málið til 2-0, og teir reyð/svørtu á FM-kós*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

brádliga upp, og við einum kontrolleraðum sparki sendi hann bóltin í málið, so nú var 2-0.

Tríggjar minuttir seinni fekk HB enn eitt fríspark, ið hesa ferð var ein metur framman fyri miðkringin, og enn eina ferð slapp Vagnur at royna seg. Hann høgdi til ímóti málinum, og Magnus Poulsen fekk í fyrsta umfari boksað bóltin av vandaleið, áðrenn hann var skotin innfyri av nýggjum. Tá eydnaðist Símuni Joensen at tveita seg fram at skalla bóltin út úr B36-brotsteiginum.

Og so gekk tað annars skjótt fyri seg hin vegin. Bárður Olsen fór avstað við bóltinum og spældi hann beinanvegin út til Hjalgrím Elttør, sum var staddur úti í vinstru síðu á egnari hálvu. Hann tók til beins og rak allan vegin fram til HB-baklinjuna, áðrenn hann bleiv takladur. Bólturin endaði fyri fótunum á Christiani Restorff Mouritsen, ið frá fimmmetrinum var ísakaldur og við vinstra beini høgdi til upp undir nettakið. So var 2-1.

### Hendingarleyst

Eftir hálvleikssteðgin var lítið veiggj í HB, sum mestsum einki megnaði fram eftir vøllinum. Í staðin yvirtók B36 so at siga alt spælið. Bólturin varð spældur væl fram ímóti brotsteiginum hjá HB, men so rendi B36 seg í ein sterkan verjumúr hvørja einastu ferð, so ikki slapst longur.

Hóast spælið hjá B36 sum so sá fínt út og í løtum var stuttligt at hyggja at, bar tað ongan veg, tí hugflogið hvarv, tá tað ráddi um at finna avgerandi sendingarnar, ið kundu skræða HB-verjuna sundur. Serliga Vagnur og Doddi í miðverjuni stóðu stinnir, men eisini bakkarnir báðir, Levi og Hendrik, fingu bundið væl fyri, samstundis sum miðjan hjálpti væl til í royndunum at forða fyri, at B36 skuldi koma ov nær.

Onkra hendinga roynd hevði B36 útifrá, men tað gjørdist ongantíð ordiliga vandamikið, og tað sama var við tilvildarligum bóltum, ið endaðu inni í HB-brotsteiginum. Størsta møguleikan hevði Jónas Þór Næs, tá hann eftir hornaspark royndi seg við einum krampaskoti, ið bara fór sentimetrar uttan fyri stongina hjá HB.

Í veruleikanum var sigurin ongantíð í vanda hjá HB, tí liðið hevði – hóast vantandi spæl fyri tað nógva av tíðini – fult tamarhald á tí, sum fór fram á tí partinum av vøllinum, har tað kundi gerast vandamikið. Og var ikki nógvur klassi yvir tí, HB royndi seg við frameftir, var í øllum førum serklassi yvir verjuspælinum henda seinasta dystin!

Tí kundi tað næstan heldur ikki enda við øðrum enn einum HB-sigri og enn einum meistaraheiti til høvuðsstaðarfelagið, ið nú er farið at ganga ímóti teimum 30... Eingin ivi er um, at meira býr í sterka hópinum hjá HB, enn liðið vísti í ár, so helst mugu hini finna seg í, at fremsta málið aftur í næsta ár verður at koppa meistaraliðnum, sum í ár hevur víst eina mentala styrki, einki annað lið hevði. Tí er meistaraheitið eisini so ruddiliga uppiborið!

*hilmarjan@sosialurin.fo*